52-124/2025

HEILSU- OG ORKUMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3, Postboks 208
110 Tórshavn

30. juni 2026
Mál: 26/15823-2
Tygara skriv:
Viðgjørt:

**Svar til skrivligan fyrispurning nr. 124/2025 frá Jenis av Rana, løgtingsmanni til Eyðdis Hartmann Niclasen, landstýriskvinnu, um orkuskifti**

**Spurningar:**

1. Hvørji ítøkilig átøk, ið tryggja, at húski við lágum inntøkum kunnu vera við í orkuskiftinum, hevur samgongan tilreiðar at seta í verk?
2. Nær kunnu hesi húski vænta, at lovaða trygdin og lovaðu átøkini verða framd í verki?

**Svar:**

Fyrireikingararbeiðið at seta ætlanir landsstýrisins í samgonguskjalinum í verk er so smátt byrjað, men ikki á øllum økjum enn.

Innan grøna orkuskiftið hava vit ein tíðarfestan orku- og veðurlagspolitikk, sum Løgtingið samtykti í 2022 og har arbeitt hevur verið miðvíst við at seta tey 23 tíðarfestu átøkini í verk. Onki átak er í tí politikkinum, sum tryggjar, at húski við lágum inntøkum kunnu verða við í orkuskiftinum. Tí verður neyðugt bæði at dagføra og víðka orku- og veðurlagspolitikkin.

Ætlanin er, at dagføringin skal byrja eftir summarfrítíðina. Í hesum sambandi skal sjóneykan setast á fleiri átøk, har eitt teirra verður at fáa húski við lágum inntøkum við í orkuskiftið.

Júst hvussu tað kann verða gjørt, má bíða eftir einum grundgivnum tilmæli frá arbeiðsbólkinum.

Vónin er at leggja uppskot um dagførdan orku- og veðurlagspolitikk og tíðarfesta virkisætlan fyri Løgtingið í komandi tingsetu.

Eyðdis Hartmann Niclasen
*landsstýriskvinna*